# Minnast farnar gæs

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Myndin lýgur ikki, hon er eitt sannleikavitni um djúpa sorg yvir flogfenað, sum alt ov brádliga varð tikin burtur frá okkum. Myndin er av einum gásagravsteini við Gjógv. Her hava havnafólk havt gæs gangandi og hesar báðar á gravsteininum fórust alt og skjótt. Skelkurin var stórur hjá teimum avvarandi, tað ber steinurin týðuligt boð um.

Hesar gæs, sum skuldi geva jólasteikir langt inn í 21. øld, glinsandi turr gásakrov, trivna og vælveru høgtíðskvøld, feita sós og annað gott góvu upp anda alt ov tíðliga og eftir er bert steinurin, sum sigur frá degnum tá brast fyri nev, á steininum mekt sum (f) og dagarnir tá kaldi deyðin vitjaði, merkt sum (d).

Gæsnar eru nú grivnar og liggja og bíða evsta degi, tá havið opnar seg og umslúkar det ganske land og alt verður eldur og rok og tey góðu verða skild frá teimum forbannaðu.







*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Billa og Dølgur*

## Dólgur leitar eftir heimi

Hesi góðu kelidjór og tey sum vara av. Mitt í tí heila so kann skilnaður gerast neyðugur og tá eru tey, sum eru góð við djórini í dýrastu neyð. Eitt nú Billa Madsen í Kvívík. Hon eigur Dølg, ein frískan, flottan, stoltan, ernan fýra ára gamlan frens og nú er tað ólukkuliga hent, at onkur er vorðin yvirviðkvæmur fyri djórum og frensurin kann ikki longur vera í húsinum. Billa vil ikki avlíva hetta ediliga djór, sum nýtir meginpartin av degnum at filosofera yvir líkt og ólíkt og tí sóknast hon eftir einum nýggjum heimi til Dølg. Tey sum hava áhuga at fáa hetta skinnið av einum frensi í húsi kunnu ringja tel. 421546/315438.

*je*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin andøvsgul upp í ein strúk av suðri og regn. Seinnapartin strúkur í vindi av vestri og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Strúkur í vindi av ymsum ættum og regn, men týsdagin stívt andøvsgul av norði og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin mánadagin um 12 stig, men týsdagin millum 5 og 8 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 8 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 18 |
| Tromsø | 16 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 20 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 12 |
| Kiev | 11 |
| Bukarest | 18 |
| Paris | 19 |
| Madrid | 27 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 27 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 18 |
| New York | – |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | – |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 21 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst, 1014 hPa. yvir Íslandi viknar og eitt lágtrýst, 1003 hPa. við Hvarvið fer eystureftir. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjadagin.




Lágtrýstið við Íslandi fer eystureftir og vestan fyri lágtrýstið rekur kaldara og turrari luft móti Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/09 kl. 06[00]– 13/09 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 10,7°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 7,3 mm – mált frá 12/09 kl. 06[00]– 13/09 kl. 06[00]
Avfallið higartil í september: 38,9 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

10. sept.: Seinna kvarter
16. sept.: Mánin næstur jørðini
17. sept.: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2001

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 14. sep | 04.30 | 16.58 | 03.30 | 15.58 | 03.45 | 16.13 | 06.30 | 18.58 | 07.30 | 19.58 | 02.45 | 15.13 | 01.45 | 14.13 | 04.45 | 17.13 | 05.45 | 18.13 | 04.15 | 16.43 | 05.30 | 17.58 |
| 15. sep | 05.24 | 17.51 | 04.24 | 16.51 | 04.39 | 17.06 | 07.24 | 19.51 | 08.24 | 20.51 | 03.39 | 16.06 | 02.39 | 15.06 | 05.39 | 18.06 | 06.39 | 19.06 | 05.09 | 17.36 | 06.24 | 18.51 |
| 16. sep | 06.17 | 18.43 | 05.17 | 17.43 | 05.32 | 17.58 | 08.17 | 20.43 | 09.17 | 21.43 | 04.32 | 16.58 | 03.32 | 15.58 | 06.32 | 18.58 | 07.32 | 19.58 | 06.02 | 18.28 | 07.17 | 19.43 |
| 17. sep | 07.09 | 19.36 | 06.09 | 18.36 | 06.24 | 18.51 | 09.09 | 21.36 | 10.09 | 22.36 | 05.24 | 17.51 | 04.24 | 16.51 | 07.24 | 19.51 | 08.24 | 20.51 | 06.54 | 19.21 | 08.09 | 20.36 |

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
Tlf. 213212